

## Jacob aftur í Neistamálið

Jacob Larsen, sum seinasta kappingarár vardi málið hjá Neistanum, verður nú aftur at síggja hjá bláa liðnum. Vælvaksni danin var ein sannur fongur fyri felagið í fjør, men av praktiskum ávum bar ikki til at leingja sáttmálan tá. Nú verður tó váttað hjá Neistanum, at avtala er gjørd við Jacob, um at koma aftur til Føroya seinna partin av kappingarárinum. Fyrsti dysturin hjá Neistanum í 2008 verður á heimavølli móti H71 tann 20. januar.

# Hepnið var við Walcott



*Unga stjørnuskotið hjá Arsenal, Theo Walcott*

**Sera kviki vongspælarin bjargaði Arsenal í gjárkvøld, tá teir tóku móti arvafíggindum sínum úr Tottenham í hálvfinaluni í Carling Cup. Tottenham komu tó á odda, men tað endaði 1-1**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Tá Jermaine Jenas í 37. minutti, legði gestirnar úr Tottenham, á odda, sá út til at Spurs skuldu vinna sín fyrsta dyst móti Arsenal, síðan í 1999. Men Theo Walcott vildi tað ørðvísi, og við hepni javnaði hann við 11 minuttum eftir at spæla í.

Jenas skoraði heldur lættliga, tá Robbie Keane legði bóltin fyri føturnar á Jenas, so at hesin kundi leggja gestirnar á odda, áðrenn kvikleikin hjá Walcott, umframt eitt fitt vet av hepni, megnaði at vinna honum eitt útjavnandi mál, eftir at Lee Young-Pyo óheppin fekk bóltin á seg, og av honum í netmeskarnar, til útjavnandi málið.

Arsene Wenger valdi í hálvleikinum at skifta Johan Djorou og Robin Van Persie út, og í teirra støð komu Bacary Sagna og Eduardo.

Júst hesin Eduardo hevur seinastu tíðini veruliga banka hart á dydnar til besta liðið. Hesin ungi og serstakliga evnaríki Brasilski Kroatin hevur víst dygdir og umframt nakrar sublimar fríspælingar til liðfelagarnar, eisini hevur skotið heilt fitt av málum fyri The Gunners.

Tað var hesin júst umtalaði Eduardo, ið skuldi vísa seg at eiga uppleggið til útjavnandi málið, so ikki kann sigast annað enn at Wenger veit hvat hann ger, tá hann keypir ung talentir. Hann hevur eina rúgvu av ungum og sera lovandi stórtalentum, og fleiri eru longu á veg inn á Arsenal liðið. So spennandi verður at fylgja við hesum talentum í framtíðini.

# Tyson og Holyfield aftur í ringin

**Mike Tyson hevur bjóðað Evander Holyfield av, og Holyfield er klárur at taka enn ein dyst ímóti "The Beast"**

NEVALEIKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Mike Tyson hevur bjóðað Evander Holyfield av. Teir báðir hava tvær hittst í ringinum áður. Báðar ferðir hevur Holyfield vunnið, og tískil hevur Holyfield góðar vónir til dystin móti Tyson, um hann verður til nakað.

- Eg havi smurt hann av tvær ferðir, og eg eri klárur at geva honum enn ein umgang, sigur Evander Holyfield, sambært BT.

Holyfield er í dag 45 ára gamal, men hóast tað er hann framvegis virkin sum boksari. Tyson er 41 ár og hevur ikki boksað síðani 2005.

Fyrstu ferð Tyson og Holyfield hittust var í 1996. Tá vann Holyfield upp á tekniskt knockout í 11. umfari. Árið eftir hittust teir aftur og tá var tað, at Tyson var dømdur at tapa dystin, eftir at hann beyt annað oyra av Holyfield.

- Ein dystur móti Holyfield er tað einasta, sum kann fáa meg aftur í ringin, sigur Mike Tyson, sambært danska blaðnum.



*Tyson er ikki bert kendur sum nevaleikari, men eisini kendur sum konufólkarevur*